

STARVSFÓLK

# BAKKAFROST SØKIR 2 STARVSFÓLK

## ALIFORMAÐUR/KVINNA

Vit søkja eftir formanni/kvinnu til eitt aliøki hjá Bakkafrost. Formaðurin/kvinnan skal kunna arbeiða sjálvstøðugt undir alileiðaranum og hevur ábyrgd av at leggja alivirksemið á sínum øki til rættis saman við teimum starvsfólkum, sum hann/hon hevur á økinum.

**Førleikakrøv:**
- Starvsroyndir á sjónum
- Fyrikomandi, góð samstarvs- og samskiftisevni

**Ynskiligir førleikar, tó eingin treyt:**
- Telduførleika á brúkarastøði
- Hóskandi útbúgving

Løn sambært avtalu

Umsóknarfreist: 30/06

Fyrispurningar: Jón Purkhús, tel 235051

Umsóknin skal stílast til: Bakkafrost Farming,
att. Jón Purkhús, alileiðari, jopu@bakkafrost.com

## FORMAÐUR/KVINNA TIL PORSJÓNSDEILDINA Á GLYVRUM

Vit søkja eftir formanni/kvinnu til porsjónsdeildina hjá Bakkafrost at byrja beinanvegin. Ábyrgdarøkið er at taka sær av framleiðsluni á tí einu vaktini. Arbeitt verður saman við einum formanni/kvinnu á einari av tveimum skiftisvaktum.

**Førleikakrøv:**
- Kunna leiða arbeiðið, gera dagroknskap
- Fyrikomandi, góð samstarvs- og samskiftisevni

**Ynskiligir førleikar, tó eingin treyt:**
- Hóskandi útbúgving og starvsroyndir

Løn sambært avtalu

Umsóknarfreist: 30/06

Fyrispurningar: Kári E. Jacobsen, tel 235011

Umsóknin skal stílast til: Bakkafrost Processing,
att. Kári E. Jacobsen, virkisleiðari, kaja@bakkafrost.com

sansir.fo

Bakkafrost er størsta alifyritøka í Føroyum. Bakkafrost hevur ræði á allari virðisketuni frá smolti til liðugvøruframleiðslu. Bakkafrost framleiðir m.a. feskan laks til sushimarknaðin og lidnar porsjónsvørur til stórar handilsketur. Bakkafrost leggur dent á lívfrøðiliga trygd, dugnalig starvsfólk, lágkostnaðarframleiðslu, virðisøking og vakstrarmøguleikar. Bakkafrost er skrásett á Oslo Børs. Umleið 450 starvsfólk starvast á Bakkafrost.

Bakkavegur 9 · PO Box 221 · FO-625 Glyvrar · Tel +298 40 50 00 · Fax +298 40 50 09 · www.bakkafrost.com

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

# Henley CIM

## Certificate in Management

Eitt ára altjóða útbúgving við fokus á persónligari menning og leiðaraeginleikum, sum gera teg føran fyri at taka rættar avgerðir.

HENLEY
UNIVERSITY OF READING

### Hvønn málbólk vendir Henley CIM sær til?
Útbúgvingin er fyri leiðarar við minst trý ára leiðararoyndum og við ambitiónum at koma víðari á yrkisleiðini. Alt tilfar, undirvísing og uppgávur eru á enskum.

### Um útbúgvingina
Útbúgvingin tekur 12 mánaðir og er uppbygd soleiðis, at hon kann fullførast við síðunar av fulltíðar starvi. Roknaðir verða 12-14 tímar av lesnaði um vikuna.

Útbúgvingin byrjar við einari workshop á tríggjar dagar á Henley Business School í Onglandi. Fylgjandi workshops verða hildnar í Føroyum við undirvísarum frá Henley Business School.

Allar uppgávur taka støði í arbeiðinum og felagnum hjá einstaka luttakaranum. Uppgávurnar eru konsulentrapportir, og úrslitini kunnu beinleiðis nýtast í felagnum.

### Persónlig menning
Ein partur av útbúgvingini er persónlig menning við m.a. persónsmeting, styrkjum og veikleikum. Støði verður tikið í núverandi støðu og framtíðar máli.

Henley liggur fremst í altjóða metingum innan persónliga menning.

### Evnir í útbúgvingini
Henley CIM gevur luttakarunum eina greiðari fatan av leiðslu og leiklutinum hjá leiðaranum í einum nýmótans felagi í einum avbjóðandi samfelagi.

Umframt persónliga menning eru fýra greinir við yvirskriftini "Managing the organisation". Hesar veita luttakaranum nýggjastu og mest framkomnu amboðini til framkomna leiðarahugsan.

### Hesar eru greinirnar:
- Dynamics of Management
- Managing People and Performance
- Managing Processes, Systems and Projects
- Managing Financial Resources

### Kostnaður:
Henley CIM kostar 82.500 krónur. Við í kostnaðinum eru undirvísing, tilfar, workshops í Føroyum og Onglandi, persónsmeting, uppgávudøming, royndir og próvtøka. Ferðaútreiðslur til Ongland eru ikki íroknaðar.

### Lestrarbyrjan:
September 2010

### Nærri kunning:
Les meira um útbúgvingina á www.henley.fo.

Eisini er møguligt at seta seg í samband við Jákup Bech Jensen á telefon 23 22 00 ella teldupost jakup@henley.fo. Jákup er føroyski umboðsmaðurin hjá Henley og hevur sjálvur tikið útbúgvingina.

Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við Leif Bergmann, sum er leiðari fyri Henley í Norðurlondum á telefon +45 7110 5005 ella teldupost leif.bergmann@henleynordic.com.

### Um Henley Business School:
Henley Business School er ein av teimum fáu leiðslustovnunum í heiminum, sum hevur fingið tríggjar viðurkenningar: AMBA í Stóra Bretlandi, AACSB í USA og EQUIS í Evropu.

Bæði Henley Excecutive MBA og aðrar útbúgvingar hjá Henley Business School eru útnevndar á metingum hjá Financial Times yvir bestu leiðaraútbúgvingarnar.

Accredited by Association of MBAs · AACSB ACCREDITED · EFMD EQUIS ACCREDITED

**Altjóða viðurkenning er tín trygd fyri, at tú fært fult virði fyri pengarnar**